# ítróttur

Nr. 146 • leygardagur • 3. august 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


# Sama søgan í Svøríki

**Føroysku dreingirnir fáa ikki mál, tá teir hava møguleikar, og tá teir gera mistøk, eru mótstøðumenninir avgjørdir**

NM U–17 LANDSLIÐ

*Jóannes Hansen*

Í hesi vikuni er føroyska U–17 landsliðið í Luleå í Svøríki, har teir kappast í árligu NM kappingini. Hesa ferð eru føroyingarnir í bólki við Onglandi, Noregi og Svøríki. Týsdagin spældu Føroyar ímóti Onglandi, og mikukvøldið var Noreg á skránni.

Tað hevur onkra ferðina roynst betur hjá føroyingum, enn tað hevur gjørt hesa ferð. Báðir dystirnir endaðu við 4–0 tapi. Í gjárkvøldið skuldu Føroyar spæla ímóti Svøríki. Vánirnar vóru ikki heilt góðar, tí Svøríki megnaði 2–2 ímóti Noregi, meðan Svøríki tapti 5–2 ímóti Onglandi.

Í hinum bólkinum eru Danmark, Finnland, Ísland og Slovakia. Serliga íslendingar hava gjørt um seg. Teir megnaðu 0–0 ímóti Slovakia, og teir smurdu Danmark av 3–0. Danmark vann 2–1 á Finnlandi, og Finnland vann 1–0 á Slovakia. Dagfinn Olsen var dómari, tá Ísland og Slovakia spældu málleysan javnleik.

– Vit høvdu roknað við, at dysturin um sjeynda plássið leygardagin fór at standa millum okkum og Ísland. Soleiðis verður tað ikki, tí Ísland hevur staðið seg so væl. Men kanska verður tað ímóti Danmark.

Tað sigur Bill Jacobsen, venjari hjá U–17 landsliðnum. Hann ásannar, at breiddin í hesum árganginum á føroyska liðnum er ikki tann, sum hon hevur verið okkurt annað árið, men hann heldur, at liðið hevði betri uppiborið í fyrsta dystinum, sum var ímóti Onglandi.

– Eftir 1. hálvleik var málleyst, og tá spældu vit upp til teir á øllum økjum. Hagtølini staðfesta hetta. Teir høvdu fýra hornaspørk, og vit høvdu trý. Teir høvdu tvær góðar royndir ímóti málinum, sum Gunnar Nielsen – hann varð eftir dystin kosin at vera besta føroyski spælarin – bjargaði, og Jóhan Petur Poulsen, Páll M. Joensen og Emil N. Leifsson høvdu góðar royndir ímóti eingilska málinum.

Eftir steðgin var gongdin ikki ókend. Ongland fekk brotsspark, tá 26 sekund vóru farin, og teir skoraðu aftur í 54., 61. og 70. minutti. 2–0 málið var ikki serliga harðlig skotroynd úr stórari fjarstøðu, sum fór millum nógvar spælarar. Tá teir skoraðu til 3–0 og 4–0 vóru verjuspælarar snýttir, og uppbakkingin kiksaði.

Málskjúttarnir vóru úr Aston Villa, Milwall og Sheffield Wednesday. Og hinir eingilsku spælararnir vóru úr kendu eingilsku feløgunum.

Ofta hava onkrir eingilskir spælarar verið framúr í NM kappingunum fyri U–17 landslið, og so eru teir seinni vornir heilt kendir í eingilskum fótbólti. Hesa ferð hava teir í Svøríki serliga lagt til merkis Adrian Tettgrew úr Chealsea. Hann skoraði fýra mál ímóti Svøríki.

### Tríggir stútarar eftir horna

Ímóti Noregi gekst Føroyum mótsatt, sum tað gjørdi ímóti Onglandi. Trý av teimum fýra málunum vórðu skorað í 1. hálvleiki. Í 2. hálvleiki var føroyska liðið betri við síðsta stóra hálva tíman, og teir høvdu tríggjar royndir ímóti norska málinum, men teir fingu einki mál.

– Øll trý málini í 1. hálvleiki vórðu stútað eftir horna. Vit kendu væl hornasparkskombinatiónirnar hjá teimum, men vit megnaðu ikki at byrgja uppfyri. Teir høvdu seks risastórar spælarar í okkara brotsteigi, tá teir høvdu horna. Um teir høvdu havt ein ella tveir, so kundu vit kanska megnaði at byrgt fyri, men vit hava ikki so nógvar spælarar, ið eru stórir og góðir í høvuðspælinum, sigur Bill Jacobsen.

Besti maður á báðum liðunum verður kosin eftir hvønn dyst. Eftir dystin ímóti Noregi varð Páll M. Joensen kosin besti føroyski spælarin.

### Liðið

Í báðum teimum fyrstu dystunum var føroyska liðið mannað við teimum somu ellivu frá fyrsta bríksli. Teir eru Gunnar Nielsen, HB – Fritleif í Lambanum, ÍF, Jústinus Hansen, NSÍ, Poul N. Joensen, VB, Jónas Þór Næs, HB – Bogi Hermansen, B36, Mikkjal T. Hentze, B71, Emil N. Leifsson, HB, Jóhan Eivind R. Mouritsen, HB – Páll M. Joensen, HB, Jóan Petur Poulsen, B68.

Í dystinum ímóti Onglandi vóru fimm útskiftingar. Í 67. minutti varð Steffan Kalsø, KÍ, settur á vøllin fyri Páll M. Joensen og Teitur R. Joensen, Skála, kom inn fyri Mikkjal T. Hentze. Í 73. minutti kom Urbanus Olsen, KÍ, inn fyri Jóhan Petur Poulsen, Símun Louis Jacobsen, GÍ, fyri Jónas Þór Næs og Ove Magnussen, B68, fyri Jóhan Eivind R. Mouritsen.

Teir báðir, sum ikki komu inn, vóru eykamálverjin Heini Christiansen, Skála, og U–15 landsliðsspælarin Kristian Mouritsen, HB.

Í dystinum ímóti Noregi vórðu tríggjar útskiftingar framdar. Í 52. minutti kom Steffan Kalsø inn fyri Jóhan Petur Poulsen, í 67. minutti kom Símun Louis Jacobsen inn fyri Mikkjal T. Hentze, og í 69. minutti avloysti Kristian Mouritsen eldra beiggjan Jóhan Eivind R. Mouritsen.

Umframt spælararnar og venjaran eru hesi við í føroyska ferðalagnum: Pætur Clementsen er hjálparvenjari, Heri Olsen liðleiðari, Álvur Hansen og Sóley Mikkelsen ferðaleiðarar og Fanny Kruse er fysioterapeutur.



*Klaksvíkingurin í Runavík, Bill Jacobsen, er venjari hjá føroyska U-17 liðnum, sum í hesum døgum roynir seg í NM kapping í Svøríki*

## Støðan, 1. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 10 | 7 - 2 - 1 | 30 | 9 | 21 | 23 |
| 2 | GÍ | 10 | 6 - 1 - 3 | 18 | 15 | 3 | 19 |
| 3 | NSÍ | 10 | 5 - 3 - 2 | 18 | 13 | 5 | 18 |
| 4 | B68 | 10 | 5 - 3 - 2 | 16 | 14 | 2 | 18 |
| 5 | KÍ | 10 | 5 - 2 - 3 | 23 | 13 | 10 | 17 |
| 6 | B36 | 10 | 4 - 2 - 4 | 29 | 18 | 11 | 14 |
| 7 | VB | 10 | 3 - 3 - 4 | 7 | 8 | -1 | 12 |
| 8 | EB/Streymur | 9 | 2 - 1 - 6 | 9 | 20 | -11 | 7 |
| 9 | TB | 9 | 1 - 2 - 6 | 11 | 38 | -27 | 5 |
| 10 | Skála | 10 | 0 - 3 - 7 | 8 | 21 | -13 | 3 |

## Støðan, 2. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FS V | 9 | 6 - 2 - 1 | 33 | 8 | 25 | 20 |
| 2 | Sumba | 9 | 4 - 3 - 2 | 14 | 12 | 2 | 15 |
| 3 | LÍF | 9 | 4 - 2 - 3 | 18 | 15 | 3 | 14 |
| 4 | ÍF | 9 | 4 - 1 - 4 | 21 | 18 | 3 | 13 |
| 5 | KÍ | 9 | 3 - 4 - 2 | 14 | 14 | 0 | 13 |
| 6 | B71 | 9 | 3 - 3 - 3 | 12 | 8 | 4 | 12 |
| 7 | HB | 9 | 3 - 2 - 4 | 13 | 13 | 0 | 11 |
| 8 | B36 | 9 | 2 - 4 - 3 | 10 | 16 | -6 | 10 |
| 9 | NSÍ | 9 | 3 - 1 - 5 | 8 | 14 | -6 | 10 |
| 10 | VB | 9 | 2 - 0 - 7 | 5 | 30 | -25 | 6 |



# Miðvøllurin er leikbannaður

**Bæði Fróði Benjaminsen og Fríðin Ziskason verða burturfrá, tá B68 fær vitjan av illa sperdu tvørámonnunum**

B68–TB

*Jóannes Hansen*

Í morgin fáa Frank Skytte og B68 vitjan av gamla felagnum hjá B68 venjaranum. TB er ikki væl fyri, men B68 venjarin vónar sjálvandi ikki, at hansara menn fara at vera so bliðir við TB á vøllinum, at tað fer at ganga út yvir úrtøkuna.

B68 venjarin og fleiri aðrir úr felagnum vóru á Mølini á Eiði mikukvøldið. Teir eru neyvan ræddir av tí, sum teir sóu TB avrika, men B68 formaðurin Niclas Davidsen er sær sjálvum líkur, tá hann úttalar seg:

– Tað er altíð torført at spæla ímóti einum liði, sum er eitt sindur kroyst. Tvørámenn eru næstniðast, og teir vita væl, at teir hava brúk fyri stigum. TB hevur áður tikið stig fyri okkum á Svangaskarði, og vit eru greiðir yvir, at vit vinna ikki, uttan at vit stríðast fyri søkini.



*Hjá Øssi Hansen og B68 ræður nú um at halda fast í oddinum, og tískil er einki minni enn ein sigur nóg gott hjá toftamonnunum í morgin*

Hjá B68 er talan um eitt sindur av mannfalli á miðvøllinum. Fróði Benjaminsen er leikbannaður, og tað er Fríðin Ziskason, sum varð útvístur í 10. umfari ímóti HB í Gundadali, eisini. Hinir, sum fyrr í ár hava verið við til at manna miðvøllin, eru allir tøkir. Talan er fyrst og fremst um Marlon Jorge, Jann Inga Petersen og Boga Petersen.

B36 málverjin Tróndur Vatnhamar vandi við B68 hóskvøldið. B68 formaðurin sigur, at Tróndur spurdi, um hann kundi venja við, og tað var alt í lagi. Ongar ætlanir hava verið um, at B68 skal gera avtalu við málverjan, sum ólavsøkuaftan varði B36 málið í 2. hálvleiki ímóti KÍ.

Hjá TB eru somu spælararnir tøkir, sum vóru við á Eiði mikukvøldið. Sum tað varð sagt í blaðnum í gjár, so vísti TB vilja at spæla ímóti EB/Streymi, men tað bilaði bæði í álopspartinum og í verjuni, sum í tíggju umførum hevur latið 42 mál fara ígjøgnum. Eingin ivi er um, at tvørámenn høvdu verið meiri enn fegnir, um teir í morgin kundu farið suður aftur við einum stigi.

# Christian Høgni skal í eldin aftur

**Tað hevur gingið væl hjá føroyska spælaranum í Vejle, sum ivaleyst verður millum teir fyrstu ellivu í dag**

ÚTISETI

*Jóannes Hansen*

Meðan gomlu liðfelagarnir í NSÍ vóru á ólavsøku eftir løgmanssteypinum, og meðan teir hava frøtt seg um finalusigurin, hevur Christian Høgni Jacobsen arbeitt av lívsins kreftum í Danmark.

Málið hjá honum er at vinna sær fast pláss ímillum teir fyrstu ellivu á liðnum hjá Vejle, og tað sær út til at ganga væl. Christian Høgni hevur verið við frá fyrsta bríksli flestu ferðirnar, og hann hevur fingið nógva spælitíð.

Venjarin Frank Petersen sigur seg vera væl nøgdan við leikligu avrikini hjá Christian Høgna, og bæði Christian Høgni og hinir í Vejle gleðast um, at tað nú er komið hol á málskjótingina hjá føroyska spælaranum. Í trimum teimum seinastu venjingardystunum hevur Christian Høgna skorað tvey mál, m. a. eitt ímóti superligu liðnum hjá AaB.

Fyrsta stigið ímóti uppflytingini til superliguna, sum Vejle fyrr í summar flutti niður úr, verður tikið í dag. Christian Høgni Jacobsen og liðfelagarnir eru í Keypmannahavn, har teir seinnapartin skulu spæla á Tingbjerg stadion ímóti Brønshøj.



*Tað gongur væl hjá landsliðsleikaranum úr Runavík, Christian Høgna Jacobsen, í danska felagnum Vejle. Málið hjá honum er at vinna sær fast pláss í álopinum*